# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Obama sigur, at hann fer at flyta hermenn úr Irak til Afghanistan, men tað er dømt at miseydnast*
*Ayman al-Zawahiri*

# Cheney ákærdur fyri ágang ímóti fangum

**Amerikanski varaforsetin er ákærdur fyri at hava fingið pengar burtur úr privatum fongslum í statinum Texas, har fangar hava fingið ringa viðferð**



*Dick Cheney, varaforseti, og Alberto Gonzales, fyrrverandi løgmálaráðharri, skulu kanska í rættin*
*Mynd: AFP*

Tað er ein l'gfrøðiligur stovnur í Texas, sum hevur reist ákæruna, men tað er ikki vist, at málið kemur í rættin, tí eftir skipanini skal ein dómari góðkenna ákæruna fyrst, og tað er ikki gjørt enn, skrivar Reuters.

Sambært ákæruni skal Dick Cheney hava gjørt íløgur fyri næstan 600 milliónir krónur í tey privatu fongslini í Texas, og tí vilja fólkini aftan fyri ákæruna vera við, at varaforsetin má átaka sær ein part av ábyrgdini av, at fangar hava fingið ringa viðferð í hesum fongslunum. Tey stevnandi vísa eisini á, at sum varaforseti hevði Cheney ávirkan á, hvør kundi fáa loyvi at reka privat fongsul.

Umframt Dick Cheney er fyrrverandi løgmálaráðharrin Alberto Gonzales stevndur í sama máli, tí at hann fyri tveimum árum síðani forðaði fyri, at viðurskiftini í teimum privatu fongslunum í Texas blivu kannað.

## Onga viðmerking

Stevningin umfatar ikki fangar, sum sita ella hava sitið í amerikonskum fongslum í øðrum londum sambært yvirgangslógini, hóast fleiri amerikanskir fjølmiðlar hava nevnt, at bæði George W. Bush, forseti, og Dick Cheney, varaforseti, kunnu ábyrgjast fyri viðferðina, sum teir fangarnir hava fingið.

Talskvinnan hjá Chenty, Megan Mitchell, vil ikki gera viðmerkingar til stevningina í Texas.

- Vit hava ikki fingið nakra stevning, og tí kann eg sjálvandi ikki siga nakað um hetta, sigur hon við Reuters.



*Nú kemur íslendskt stórhvalatvøst í handlarnar í Japan*
*Mynd: Morgunblaðið*

# Japanar fáa stórhvalatvøst úr Íslandi og Noregi

**Myndugleikarnir í Japan hava givið fyritøkum loyvi til at innflyta stórhvalatvøst úr Íslandi og Noregi**

Fyribils hava fyritøkurnar fingið loyvi at innflyta 65 tons av stórhvalatvøsti. Talan er um sildrekatvøst, sum hevur ligið á goymslu í einum frystirúmi síðani í juni.

Íslendski fiskimálaráðharrin, Einar K. Guðfinnsson, sigur við íslendskar fjølmiðlar, at hann vónar, at stórhvalaveiða aftur kann gerast ein verulig vinnugrein í Íslandi. Hann sigur, at hendan vinnan kann geva mong arbeiðspláss og harafturat fremmant gjaldoyra.

Fiskimálaráðharrin heldur ikki, at skynsom stórhvalaveiða fer at skaða umdømi Íslands, so leingi veiðan er burðardygg.

# Mamman doyvdi og fjaldi hana fyri at fáa finningarlønina

**Í tríggjar vikur leitaði løgreglan eftir 9 ára gomlu Shannon, sum sambært mammuni var horvin. Men tað var ikki sannleikin**



*Tann 9 ára gamla Shannon bleiv fjald og doyvd*
*Mynd: BBC*

Í gjár byrjaði rættarmálið ímóti Karen Matthewsi, sum er skuldsett fyri at hava darvað arbeiðinum hjá løgregluni og fyri at hava misrøkt sína níggju ára gomlu dóttir.

Í ákæruritinum stendur, at Karen Matthews og ein vinmaður, sum hjálpti henni, ætlaðu at fjala gentuna í longri tíð. Seinni skuldu tey boða frá, hvar gentan var, og á tann hátt skuldu tey fáa 500.000 krónur í finningarløn frá einum lokalum blaði.

Á tí fyrsta rættarfundinum kom fram, at Karen hevði greitt nøkrum vinfólkum frá, at hon hevði biðið ein vinmann hava dóttir sína, tí hon ætlaði at rýma frá sambúgva sínum. Men ætlanin miseydnaðist. Tá hon skuldi siga sambúgvanum, hvat hon ætlaði, megnaði hon tað ikki. Ístaðin fyri valdi hon at boða frá, at dóttirin var horvin á veg heim úr skúlanum.

Bretska løgreglan tók málið í sera stórum álvara, tí hetta kundi vera eitt Madeleine McCann-mál afturat, skrivar The Guardian. Men 24 dagar seinni bleiv Shannon funnin, og løgreglan avdúkaði, hvat veruliga var hent. Kanningarnar hjá løgregluni vístu, at gentan hevði fingið doyvandi heilivág.

Karen Matthews og vinmaðurin vórðu tikin og hava sitið í varðhaldi síðani. Tey nokta seg sek, sigur Sky News.

## STUTT SAGT

### Nú eru 36,5% av tinginum kvinnur

Í Íslandi hevur tingbólkurin hjá Framsóknarflokkinum fingið tvær kvinnur ístaðin fyri tveir menn, og tað ger, at nú eru 36,5 prosent av altingslimunum kvinnur, skrivar Morgunblaðið.

Talan er kortini ikki um ta heilt stóru broytingina, tí frammanundan vóru 33,3 prosent kvinnur.

Morgunblaðið skrivar, at tá hetta valskeiðið byrjaði, vóru 20 kvinnur í Altinginum, og svarar tað til 31,7 prosent av tingmanningini. Síðani eru tríggjar kvinnur komnar á ting afturat. Umframt tær báðar hjá Framsóknarflokkinum er talan um eina kvinnu úr Sjálfstæðisflokkinum, sum kom á ting á sumri í fjør.

### Hýruvognar í verkfalli

Hóast ein kanska skuldi hildið, at hýruvognarnir í Kina hava nóg mikið av fólki at koyra, so stríðast teir eisini har um ferðafólkini. Í gjár løgdu 300 hýruvognsførarar í býnum Chongqing arbeiðið niður, tí teir lokalu myndugleikarnir vóru komnir við einum uppskoti um at geva fleiri loyvi at fáa sær hýruvogn.

Umleið 300.000 fólk búgva í Chongqing, og teir lokalu myndugleikarnir siga, at tørvur er á 100 hýruvognum afturat. Men tað halda teir, sum nú koyra hýruvogn, ikki, og tí settu teir bilarnar í gjár.

Hetta er ikki fyrstu ferð, at hýruvognsførarar í Kina eru í verkfalli. Fyri trimum vikum síðani stóðu 9.000 hýruvognar stillir, tí tá vóru eigararnir misnøgdir við, at tað kostaði so nógv at fylla tangan, og at teir fingu harða kapping frá bilum, sum ikki høvdu loyvi at koyra sum hýruvognar. Ta ferðina endaði alt í einum ruðuleika, og úrslitið varð, at minst fleiri hýruvognar og minst tríggir løgreglubilar vórðu oyðilagdir, skrivar AP.

Eygleiðarar í Kina siga, at alt fleiri kinesarar bera ótta fyri at missa inntøku og kanska enntá arbeiðið orsakað av fíggjarkreppuni.